# Nú verður trupult hjá VÍF



Mynd: Álvur Haraldsen

**HONDBÓLTUR** Vestmenningar vóru eitt mál frá at vinna sær eitt týdningarmikið stig í stríðnum um pláss í finalunum um føroyameistaraheitið. VÍF misti alt á gólvið seinastu løtuna, tá Neistin aftur vann

Uni Holm Johannesen

Nú er tað lítið, sum bendir á, at VÍF skal spæla í finalunum um føroyameistaraheitið.

Vestmenningar kundu vinna seg í góða støðu. Næsta vikuskiftið skal VÍF á vitjan í Kollafirði, og tað kundi verði eitt satt oddabrak, um vestmenningar høvdu vunnið, ella bara fingið stig, í gjár.

VÍF søplaði snøgt sagt sigurin burtur. Tá seks minuttir restaðu í, vóru gestirnir úr Vestmanna á odda 37-35.

## Neistin vann seg aftur

Neistin vann 38-37. Og aftur staðfestu einaráðandi havnarmenninir, at tað eru í serflokki.

Jugoslav Djumic, David Edvardsen og Finnur Hansson, sum hava verið millum teir mest eyðsýndu í hesum kappingarárinum, skutu trý mál seinastu løtuna, og VÍF svaraði ikki aftur. Og so vann Neistin aftur.

Heimaliðið legði annars bragdligari fyri. Neistin var skjótt á odda við fýra málum, og tann munurin helt sær so at siga allatíðina í fyrra hálvleiki. Eftir steðgin tóktist tað sum, at VÍF visti, at nú mátti røkka ella støkka. Gestirnir løgdu nógv fyri í seinasta royndini at vinna seg í góða støðu í finalustríðnum. Vestmenningar fingu leiðsluna, men tað, sum vendi upp, tá seks minuttir restaðu í, vendi brádliga niður tá avtornaði.

Tað var serliga í verjustøðu, at liðini vóru lítið sannførandi. Tað er sjálvsagt, tá heili 75 mál vóru skotin í alt. Neistin hevur ikki havt nakað at spælt fyri í fleiri vikur, og tað merkist sjálvsagt á avrikinum. Tað sigur hinvegin ikki lítið, at verandi greipuvinnararnir halda fram við síni sigursgongd. Seinastu vikuna hevur Neistin vunnið á bæði KÍF og VÍF, sum eru nærmastu kappingarneytarnir, og sum hava alt at spæla fyri, nú liðini, sum skulu spæla finalurnar, sum finnast.

## Møguleikin er lítil

VÍF er framvegis nummar trý við 21 stigum. KÍF, sum vann stórsigur á Team Klaksvík, er nummar tvey við 26 stigum. Átta stig eru eftir at spæla um. Vestmenningar kunnu ikki fáa fleiri enn 29 stig í hesum kappingarárinum. Tað við við øðrum orðum siga, at KÍF manglar fýra stig fyri at staðfesta sítt finalupláss.

KÍF fær vitjan av VÍF næsta vikuskiftið.

uni@sosialurin.fo

# Kyndilin er sløknaður

**HONDBÓLTUR** Tað hevur verið lítið veiggj í Kyndil seinastu vikurnar. Tað var aftur staðfest í gjár, tá StÍF vann sær tvey stig afturat í skjáttuna

Uni Holm Johannesen

Tá tað stundar til móti kappingarenda, og fleiri av liðunum hava millum lítið og einki at spæla fyri, merkist tað væl á kappingini. Liðini hava stór sveiggj í sínum avrikum.

Kyndil tykist ikki veruliga hava spælt fyri sínum møguleika at vinna seg í finalurnar um føroyameistaraheitið. Fyri tveimum vikum síðan kundu teir, um tað gekk teimum væl, vinna seg upp á annað plássið, men spælið hevur verið lítið sannførandi.

Kyndil hevur nú ikki vunnið tríggjar ferðir upp í slag. Tað hevur við sær, at H71 kann vinna seg upp á fjórða plássið mikudagin, tá hoyvíkingar fáa vitjan av StÍF.

## Heimaliðið vann uppiborið

Kyndil tapti 30-24 fyri StÍF í ítróttarhøllini á Skála í gjár. Kyndil var omaná fyrstu løtuna, men seinastu minuttirnar í fyrra hálvleiki gjørdi StÍF bart og fór framum. Í seinna hálvleiki var ongantíð nakar ivi um, hvør fór at vinna. Heimaliðið var betri, og Kyndil hótti ongantíð leiðsluna.

Serliga stóð vestmenningurin Karl Jóhan Djurhuus, Kyndil, seg væl. Hann var toppskjútti við 10 málum.

## Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 20 | 707 | 552 | 155 | 39 |
| 2 | KÍF | 20 | 571 | 521 | 50 | 26 |
| 3 | VÍF | 20 | 565 | 527 | 38 | 21 |
| 4 | Kyndil | 20 | 512 | 525 | -13 | 19 |
| 5 | H71 | 19 | 519 | 507 | 12 | 18 |
| 6 | StÍF | 20 | 516 | 528 | -12 | 13 |
| 7 | Team Klaksvík | 19 | 451 | 681 | -230 | 2 |

### StÍF – Kyndil
30-24 (16-14)

Dómarar: Karstin Joensen og Kristian Joensen

**10 min.: 5-6**
**20 min.: 10-10**
**40 min.: 20-17**
**50 min.: 24-20**

**StÍF:** Leivur Justinussen 8, Fríði R. Djurhuus 5, Jóannes Prestá 4, Sveinur Justinussen 4, Bent Djurhuus 3, Marius Joensen 2, Jógvan Berg 2, Jógvan G. Joensen 1, Høgni Jensen 1.
**Kyndil:** Karl Jóhan Djurhuus 10, Bárður Johannesen 6, Hans Áki Dal-Christiansen 3, Rani Ellingsgaard 2, Tróndur Jensen 1, Torvald Abrahamsen 1, Andreas Sólsker 1.
Útvísingar: StÍF 4, Kyndil 5.

### Neistin – VÍF
38-37 (23-20)

Dómarar: Dánjal Samuelsen og Heri Petersen

**10 min.: 11-3**
**20 min.: 17-12**
**40 min.: 28-28**
**50 min.: 34-33**

**Neistin:** David Edvardsen 10, Finnur Hansson 8, Jugoslav Djumic 5, Áki Mørk 5, Heini Hanusarson 3, Rósing Rasmussen 3, Sjúrður Thomassen 2, Guðfinnur Thorsteinsson 2.
**VÍF:** Magnus Muller 10, Áki G. Olsen 9, Bjarti Hansen 6, Rúni Fossdal 5, Joen Pauli Høgnesen 3, Sámal Joensen 2, Holgar Durhuus 2.
Útvísingar: Neistin 4, VÍF 3.

# KÍF bukaði botnliðið

**HONBÓLTUR** Kollfirðingar vunnu stórsigur, tá teir hildu fast um sína stevnan móti finaluplássi. 18 mál vóru á muni í Klaksvík fríggjakvøldið

Uni Holm Johannesen

Nú stundar av álvara til kappingarendan. Fimm lið í bestu mansdeildini spæla bara fýra dystir afturat í hesum kappingarárinum. Tá er summarsteðgur. Neistin og KÍF ella VÍF skulu hinvegin spæla tveir ella tríggjar dystir afturat. Finalurnar um føroyameistaraheitið skulu avgreiðast.

Kollfirðingar hava havt kós í finalurnar frá byrjan. KÍF hevur verið nummar tvey so at siga allatíðina, meðan VÍF og Kyndil hava runnið í hølunum.

Kyndil veittraði sínum FM-møguleika farvæl síða vikuskifti. VÍF hevur framvegis møguleikan, men tað er lítið sannlíkt, at vestmenningar fara framum kollfirðingar.

Jan Ottesen og kollfirðingar tóku eitt fet nærri finalunum um vikuskiftið. KÍF vann sum væntað á botnliðnum Team Klaksvík, og VÍF tapti fyri Neistanum. Fimm stig skilja nummar tvey og nummar trý. Átta stig eru eftir at spæla um.

## Avgreiðsluspurningur

Team Klaksvík hevur fingið tvey stig í skjáttuna higartil. Tað er góðtikið, nú púra óroyndu klaksvíkingarnir spæla í bestu deildini fyri fyrstu ferð. Sigurin á H71, sum má vera besta úrslitið hjá Team Klaksvík nakrantíð, kom sera óvæntað. Og tað er heldur ikki til at vita, nær klaksvíkingar spæla upp til sítt besta, meðan mótstøðuliðið tekur sær av løttum.

Eftir fáum minttum í badmintonhøllini í Klaksvík fríggjakvøldið var greitt, at Team Klaksvík fór ikki at hótta kollfirðingar hesaferð. Tað skrædnaði millum liðini beinanvegin, og uppgávan hjá heimaliðnum var bara at avmarka tapið.

Úrslitið var 39-21.

Næsta vikuskiftið vitjar VÍF í Kollafirði. Við einum sigri kunnu vestmenningar framvegis liva í vónini um finalupláss. KÍF kann hinvegin kveistra allan iva til viks og staðfesta plássið í finalunum um føroyameistaraheitið.